# Norðurlendskt kunningarnet við upplýsingum um sjóføði stovnað www.seafoodnet.info

Endamálið við verkætlanini er at fáa í lag eitt varandi norðurlendskt kunningar- og samskiftisnet um sjóføðisúrdráttir og gagnnýtslu av tilfeingið havsins. Verkætlanin er fíggjað av Norðurlendska Ministararáðnum (NSK og NEF) og Rannsóknastofnun fiskiðnaðarins (Rf), ið samskipar verkætlanina.

Kunningarnetið er ein samvinnuverkætlan við umboðum úr Íslandi, Danmørk, Finnlandi, Sviaríki, Noregi og Føroyum. Endamálið er at gera ein samskipanar- og kunningarpall við eitt nú slóðum, vøkuvirksemi (monitoring activities), EU-boðskrivum, leiðreglum, frásagnum og talvum um evnafrøðilig innihaldsevni, tvs., føðsluevni og dálkingarevni í sjóføði.

Verkætlanin byrjaði formliga í novembur ár 2004 og fyrsti verkætlanarfundurin varð hildin í Reykjavík í Íslandi í april 2005. Á fyrsta fundinum luttøku serfrøðingar í fiskaføðsluevnum og dálkingarevnum úr Íslandi, Danmørk, Finnlandi, Sviaríki, Noregi og Føroyum. Á fundinum varð tørvurin á betri samskipan av mátiháttaløgum (mátimetodum) og úrslitum umtalaður við tí endamáli, at betra samanberingargrundarlagið fyri data um føðsluevni og dálkingarevni í sjóføði. Umrøddir vórðu eisini møguleikarnir fyri at stovna eitt felags norðurlendskt kunningarnet um millum annað tryggleikan at eta heilsufremjandi sjóføði úr einum alsamt meiri dálkaðum havi.

Høvuðsniðurstøðurnar vóru hesar:

Tað hevur higartil verið trupult at samskipa og sammeta sjóføðisdata frá ymiskum keldum. Hetta er vegna vantandi felags leiðreglur um sýnistøku og nágreiniligar grundleggjandi upplýsingar um sýnini og mátiúrslitini.

Ymiskar forðingarnar vórðu eyðmerktar. Fleiri møguligar loysnir, sum kunnu økja og betra samanberingar av sjóføðisdata í framtíðini vórðu umtalaðar.

Avgjørt varð at seta á stovn eitt felags norðulendskt alnótarstað við slóðum til týðandi upplýsingar og kunning um sjóføði. Eitt nú evnafrøðiliga samanseting av sjóføði, tryggleika og møguligar vandar av at eta sjóføðisúrdráttir. Hvørt landið sær fer at hava ábyrgdina av at gera kunningarskjøl og harvið tryggja, at upplýsingarnar eru dagførdar.

Høvuðsúrslitið frá verkætlanini er eitt netstað (www.seafoodnet.info), ið savnar saman norðurlendska kunning, upplýsingar og data um sjóðføði úr norðurhøvum.

**Granskingarkjarnin í evnafrøði og lívtøkni**
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
V. U. Hammershaimbsgøta 11
100 Tórshavn
t-bræv: horaldurj@hfs.fo
heimasíður: www.hfs.fo www.fvg.fo
P. S. Upplýsing um fisk og fiskiveiðu finst eisini á føroysku heimasíðuni: www.fishin.fo

Tekniski Skúlin Klaksvík

## Lærari í enskum

til yrkisútbúgving í El- og Maskinfakinum verður søkt eftir einum undirvísara við førleika í enskum á E-stigi at byrja 23. januar 2006.

**Tímarnir eru hesir:**
- elektrikkarar, 8 tímar/viku, 30. januar til 7. apríl 2006
- maskinsmiðir, 4 tímar/viku, 30. januar til 7. apríl 2006
- maskinsmiðir, 4 tímar/viku, 23. januar til 7. apríl 2006.

Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 13. januar.

Eru spurningar, so kunnu áhugað venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20 · 700 Klaksvík
www.tsk.fo

## Felags barnaverndartænastan fyri

Sunda-, Eiðis-, Hvannasunds- Viðareiðis-, Húsa kommunur er at hitta yrkadagar kl. 8.00-16.00 á tlf. **47 10 22**.

Uttanfyri hesar tíðir ber til at koma í samband við barnaverndarnevndina á tlf. **77 10 22**.

SUNDA KOMMUNA
**Sunda kommuna, barnaverndarumsitingin**

HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN ALT VIKUSKIFTIÐ



VIVA

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
TELEFON 22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

# Koyrikort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin **09. januar kl. 18.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mánadagin **09. januar kl. 19.30**

SISERKO 351800

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

Jekaragøta 10 • Tórshavn

variant
Galvaniseraðir viðfestisvognar



Sosialurin 341800

Eykalutir, útgerð, søla og tænasta. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla · smásøla · umboð
Tel 31 56 00
www.andreasen.fo

Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!




Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin